# Talentfullar poppgentur søkjast

**Leygardagin verður upptøkuroynd, fyri at finna gentur til ein nýggjan føroyskan poppbólk**

UNDIRHALD
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú hava allar evnaríkar gentur millum 16 og 26 ár møguleika fyri at blíva poppstjørnur. Til ein nýggjan poppbólk leita teir báðir vælkendu stjørnumakararnir Kári Jacobsen og Eyðfinn Jensen eftir gentum, sum duga at syngja, dansa og framføra. Teir báðir hava bæði saman og hvør sær staðið aftanfyri hópin av tónleika-verkætlanum gjøgnum árini. Millum annað minnast vit gentubólkin PoppKorn, sum gjørdist ein av best seljandi føroysku bólkunum nakrantíð.

- Hesaferð er ætlanin tó at samanseta ein øðrvísi bólk. Nevniliga við vaksnum og/ella næstan-vaksnum gentum, sum tónleikaliga og sjónliga vendir sær til hin vaksna lurtaran, siga teir báðir, sum eisini siga seg leggja dent á tónleikaliga og sangliga dygd.



*Teir báðir Kári Jacobsen og Eyðfinn Jensen stóðu eisini aftanfyri gentubólkin PoppKorn, sum gjørdist ein av best seljandi føroysku bólkunum nakrantíð.*
*- Hesaferð er ætlanin tó at samanseta ein bólk við eldri gentum, sum tónleikaliga og sjónliga venda sær til vaksna lurtaran, siga teir báðir*

## Verð teg sjálva

Upptøkuroyndin verður í útvarpshúsunum hjá Kringvarpinum leygardagin kl. 13.

- Mannagongdin verður hendan: Tú kemur inn og sigur hvør tú ert, og syngur so ein sjálvvaldan sang. Harumframt verður tú leiðbeint í nøkrum einføldum dansitrinum, siga teir. Og teir leggja afturat, at alt sjálvandi fer fram í einum vinarligum og virðiligum anda.

- Stemningurin verður lættur og óhátíðarligur – hóast tað verður tikið 100% í álvara, siga teir, og enda við, at heita á allar áhugaðar gentur:

- Kom inn og verð teg sjálva – vit gleða okkum at síggja teg!




Nýtt!
Elektroniskt kotulás
Ver tryggur við einum elektroniskum lási frá okkum.
Lásini fáast eisini til fingraavtrykk!
Heilt nýggj og øðrvísi lás!
Høg góðska og tryggleiki uttan nýtslu av lyklum. 10 ymiskar kotur, vel tølini (1-10) sjálv/-ur. Passar til vanligar lásakassar. Kann setast í inn- og úthurðar.
Tolir veður og vind. Kann latast upp bæði uttanífrá og innanífrá við kotu.
Kann eisini fáast við alarmskipan.
Vælegnað til barnafamiljur, almennar stovnar og fyritøkur. 2 ára garanti
Valdemar Lützen Byggibúð
Skálatrøð 14 Tel 30 10 20 · vlb@vlb.fo



STRAMMA KROPPIN
UTTAN
SKURÐVIÐGERÐ
Við elektroniskari biostimulatión, ið strammar vøddarnar, og ultraljóði, ið stimulerar vevnaðin, bjóðar intone kosmetiskar viðgerðir. M.a. ber til at fáa klænkiviðgerðir, uppstrammingar av kroppinum og viðgerðir fyri "appelsinhúð". Viðgerðirnar verða gjørdar av starvsfólki, ið hava útbúgving innan kostvegleiðing. Intone nýtir einans góðkend viðgerðartól frá Ultratone.

Vikutilboð

8 kropsviðgerðir fyri kr. 2.800,-
+ 4 ultraljóðsviðgerðir ÓKEYPIS

50% longri fyri sama prís

8 andlitsviðgerðir fyri kr. 2.800,-
+ 50% meira í tíð ÓKEYPIS

ÓKEYPIS ultraljóðsviðgerð

Tilboðið er galdandi frá 31. mars til og við mánadagin 7. apríl 2008

Mánadag, týsdag og hósdag.........10.00-18.00
Mikudag og fríggjadag ..................11.00-18.00

in•tone clinic
J. Paturssonargøta 18 · Tórshavn · Tel 322045